## Dandy til Turkalands

Mong munnu minnast tað slaggi av tyggigummi, sum æt Dandy. Tað er danskt, men eitur nú Gumlink, og um stutta tíð verður tað heldur ikki so danskt longur. Tey, sum eiga tað næstan hundrað ára gamla tyggigummivirkið í Vejle, hava nú gjørt av at flyta tað mesta av virkseminum til Turkalands. Umleið 360 fólk arbeiðs á framleiðsludeildini í Vejle, og tey fingu í gjár boð um avgerðina, sum sambært leiðsluni er tikin fyri at bjarga einum parti av framleiðsluni í Danmark. Sambært Vejle Amts Folkeblad, verða tey fyrstu arbeiðsplássini í Vejle løgd niður í januar næsta ár.



## Granskarar á ísflaka

Í næstu viku fara nakrir danskir og grønlendskir granskarar upp á ein ísflaka tætt við Norðpólin, og ætlanin er so, at teir skulu búleikast á ísflakanum tær næstu tríggjar vikurnar, sigur danska veðurstovan DMI. Í granskarahópinum eru jarðfrøðingar, jarðalisfrøðingar, verkfrøðingar og teknikarar, og teir skulu royna at fáa eina mynd av teimum stóru broytingunum, sum hava verið í tí arktiska økinum tey seinnu árini. Herumframt skulu tól hjá DMI kanna hita- og saltviðurskiftini í sjónum, og hvussu havstreymarnir eru.




# SEV fær 100.000 í oljurokning

**Vanliga er tað SEV, ið sendir rokningar, men um stutta tíð fær SEV eina rokning frá Tórshavnar kommunu, sum ljóðar á minst 100.000 krónur, sambært Kartni Jakobsen, sløkkiliðsleiðara.**

OLJA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár var heilt nógv olja á Kaldbaksfirði, sum rak inn í Kaldbaksbotn, har sløkkiliðið í Havn hevur tikið oljuna upp. Talan var um umleið 2000 litrar av olju, ið fóru á sjógv, og roykurin var ramur.

Nú er sløkkiliðið næstan liðugt við sítt arbeiði.

- Vit hava fingið einar 8000 litrar av blandingi av sjógvi og olju, og tá sigi eg í hvussu so er ikki ov lítið, staðfestir sløkkiliðsstjórin. Hann leggur afturat, at teir nú fara at taka sperringarnar uppaftur, og at fólk fara at verða sett at grava skitna sandin og taran burtur.

### Ongin vanlukka

Tó fegnast Kartni Jakobsen, at lotið hevur ligið inn á fjørðin alla tíðina.

- Oljan hevur verið verandi í sama stað alla tíðina, so tað hevur verið rímiliga lætt at taka oljuna upp. Og eg havi ikki sæð fuglar, ið hava verið dálkaðir, og kanska er ein hinumegin fjørðin, sum eg síggi beint nú, men eg haldi ikki, at fuglar hava verið nakað serliga nær. Kanska lukturin hevur stygt teir, sigur sløkkiliðsstjórin. Sum fegnast at skaðin hevur verið so lítil.

# Tvær nýggjar andaligar bøkur

**Osvald Kjærbo hevur latið tvær nýggjar bøkur av hondum. Lív Símun Pæturs og brøv hansara er heitið á einu bókini, og hin ber heitið Kristus í Hebrearabrævinum**

ÚTGÁVUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Prædikumaðurin Osvald Kjærbo hevur latið tvær nýggjar bøkur av hondum. Kristus í Hebrearabrævinum er heitið á eini bókini, og hin ber heitið Lív Símun Pæturs og brøv hansara. Undan hesum báðum útgávum, hevur Osvald Kjærbo givið fimm bøkur út síðan 2004. Stílurin er hin sami, og fara hesar báðar nýútkomnu bøkurnar á somu hill, sum undanfarnu: Á hillina við andaligum bókum.

Í innganginum til bókina, Kristus í Hebrearabrævinum, sigur høvundin, at hann hevur í hyggju at viðgera høvuðsevnið, sum er Kristus í lívi teirra trúgvandi. Eingin veit, hvør hevur skrivað Hebrearabrævið, og verður tað tískil ofta róp Hitt faðirleysa brævið.

"Men Gud, sum hevur gleði sína í at vera faðir teirra faðirleysu, hevur av sonnum ættleitt hetta bræv. Maðurin ella kvinnan, ið festi orðini á blað, verður goymd og gloymd í skugganum av sjálvum høvundanum, sum er eingin annar enn Gud orðsins", sigur høvundin í innganginum til bókin, Kristus í Hebrearabrævinum.

### Pætur var ikki flogvit

Osvald Kjærbo greiðir í innganginum av bókini, Lív Símun Pæturs og brøv hansara, frá hvussu hugtikin hann altíð hevur verið av Símun Pæturi, lærusveini Krists. Hann skrivar soleiðis í innganginum. "Hann var hvørki flogvit ella valdsharri. Nei, tað vóru ikki slíkir eginleikar, sum lyftu hann uppá tindarnar innan okkurt kent fróðskaparsetur. Og heldur ikki var her hann herleiðari ella tjóðarhetja í onkrum stórveldi. Vit vita einki um, at hann var kendur fyri ítróttaravrik ella listagávur av onkrum slagi, sum fólk gjøgnum allar øldir hava virðismett og sett høgt. Nei, hevði hann ikki verið lærusveinur og ápostul Harrans Jesusar, so hevði valla nakað mansbarn kent hann í dag. Jesus úr Nasaret útvaldi og kallaði henda mann til tænastu og uppgávur, sum Harrin hevði goymt honum at útinna ásettan tíma í frelsuráðið Guds."

Báðar bøkurnar eru at fáa í bókabúðunum.

